# **Flutningstrygging** – Fylgiblað nr. 100.2

## Mannagongd – móttøka av vøru og fráboðan av skaða

**Tá vøra verður móttikin**
Sjónligur skaði ella vantandi vøra:
- Vøran skal kannast beinanvegin.
- Um skaði sæst, ella um vøra vantar, skal hetta viðmerkjast á farmabrævið.
- Flutningsfelagið skal ábyrgjast skrivliga fyri skaðan ella vantandi vøruna.

**Ikki-sjónligur skaði**
Um skaði vísir seg eftir at vøran er móttikin, skal flutningsfelagið ábyrgjast skrivliga beinanvegin, og í seinasta lagi innan:
- 3 dagar – flutningur við skipi
- 7 dagar – flutningur við bili
- 14 dagar – flutningur við flogfari
- Um flutt við posti, fráboðan við móttøku

**Vøra í bingju**
- Bingja og segl skulu kannast beinanvegin.
- Um skaði sæst, skal hetta viðmerkjast á farmabrævið.
- Skadd segl, ella segl við øðrum nummari enn ásett, skulu verða goymd.

**Tá skaði er**
- Vørueigari skal fyribyrgja og avmarka skaða í mest møguligan mun.
- Er skaðin størri enn kr. 10.000, skal Betri Trygging hava boð beinanvegin.

**Endurgjaldskrav til Betri Trygging**
Endurgjaldskravið skal vera skrivligt, og skal innihalda:
- Ávísing til tryggingarskjal
- Uppgerð yvir skaddu vøruna
- Keyps- ella sølufaktura
- Flutningsskjøl, t.d. farmabræv, waybill, farmagjaldsrokning, konnossemet
- Avrit av fráboðan, har flutningsfelagið verður ábyrgdað fyri skaðan
- Onnur viðkomandi skjøl
- Møguligar myndir.

**Havari Grosse**
Um *Average Bond* í sambandi við Havari Grosse verður fráboðað, skal Betri Trygging hava boð beinanvegin.

betri

Betri Trygging
Postboks 329
Kongabrúgvin
FO-110 Tórshavn

Tel. +298 348 600
trygging@betri.fo
www.betri.fo